# Leysasøkk úr Tallin

Tað nýggja estlendska frælsisstríðið fekk ferð, eftir at Gorbatjov í 1985 varð kosin til aðalskrivara í Sovjetsamveldinum. Politiskar umstøður og taktisk neyðsyn høvdu við sær, at henda tilgongd ikki altíð var bersøgin og opin. Eitt nú hevði tað stóran týdning, at ætlanin var at byggja eina nýggja havn við Muuga eystan fyri Tallin og at lata upp eitt nýtt fosfatnám í Rakvere. Vistfrøðiliga vóru hesar ætlanir ikki skynsamar, og tí reistist ein mótstøða, sum at síggja til snúði seg um umhvørvi, men í roynd og veru eisini var politisk



*Gøtumynd úr Vøru*

*Mynd: Hanus Kamban*

*Hanus Kamban*

**SEINNI PARTUR**

Longu áðrenn russarar í 1710 tóku Estland, hevði Tallin verið fyri ógvisligum bakslattum. Hungursneyð og eldibrandar høvdu herjað fleiri ferðir. Í 1710 — sama ár sum pokurnar gingu í Havn — gingu tær eisini í Tallin. Tá ið av tornaði, vóru bara o.u. 1700 íbúgvar eftir í býnum — av tilsamans 10.000.

Tað mest týðandi andaliga rákið í hesum russiska tíðarskeiðinum var helst tann týska romantikkin, sum gjørdi vart við seg í Estlandi eins og í Norðurlondum. Vit eiga at minnast til, at Johann Gottfried Herder, sum íbirti romantikkina, fekk sína útbúgving við lærda háskúlan í Königsberg, virkaði sum lærari og rithøvundur í Riga árini 1764-69 og hevði stóran áhuga fyri estiskum kvæðum og vísum.

## Estland verður tjóðveldi í 1918

Estiska tjóðskaparrørslan tók seg upp miðskeiðis í 19. øld. Nú komu yrkingar, stuttsøgur og skaldsøgur á estiskum. Ein risi í hesi menning var læknin F.R. Kreutzwald (1803-82), sum gav út tað estiska tjóðkvæðið *Kalevipoeg*. J.V. Jannsen (1819-90) gav út tað fyrsta tíðindablaðið. Dóttir hansara Lydia Koidula bleiv ikki minni gitin — sum skald og leikritahøvundur. Umboð fyri eina seinni rørslu — naturalismuna — er skaldsøguhøvundurin Eduard Vilde (1865-1933)

Tá ið zarríkið fall í februar 1917, og eftir at bolsjevikkar høvdu framt sína kollvelting í oktober sama ár, var Estland til reiðar at fara upp í sín europeiska brøðraflokk, ein ung, hugagóð tjóð, við list og bókmentum, við máli og mentan óskalaðum. Tað estiska tjóðveldið varð borið í heim tann 24. februar 1918. Tann 2. februar 1920 skrivaðu Estland og Sovjetsamveldið undir Tartusáttmálan, har Sovjet viðurkendi tað estlendska ríkið, og báðir partar samdust um landamarkið.

Millum teirra, sum gjørdu vart við seg í hesi fyrstu estisku frælsistíðini var ein unglingi, sum æt Pent Nurmekund. Hann las eitt skifti mál í Keypmannahavn og kom helst soleiðis at kenna føroysk mentafólk har. Grein hansara "Tjóðríkið Eesti" í *Varðanum* er kanska einasta estiska lívstekin í føroyskum bløðum í millumkrígstíðini. Framtíðin hjá teimum smáu Baltalondunum sýntist ljós. Hóast myrkur legðist yvir stórar partar av Europa, var móti endanum á tríatiárunum fáur, sum ivaðist í, at Estland og tess grannar høvdu framtíðina fyri sær.

## Tann týsk-russiska klípitongin

Bakslátturin kom í 1939. Við friðarsáttmálanum, sum tann týski uttanríkisráðharrin von Ribbentrop og russiski starvsbróðir hansara Molotov skrivaðu undir tann 23. august hetta árið, var komin ein politisk støða, sum var spildurnýggj. Stórveldini Týskland og Russland (Sovjetsamveldið) vóru fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð farin í samgongu. Finnland, Pólland og Baltalond lógu nú sum lús ímillum tvær negl. Sáttmálin snúði seg mest um handil, men í einum loyniligum skjali hevði Sovjetsamveldið tilskilað sær yvirræði yvir m.a. Estlandi.

Tann 18. juni 1940 varð Estland tikið. Frakland fall sama dag, og russar sóu sær helst løgir, nú øll hugdu tann vegin. Tann 6. august varð Estland gjørt til eitt sovjetskt tjóðveldi. Allir limir í stjórnini vórðu handtiknir og førdir sum fangar til Russlands. Konstantin Päts, fyrrverandi forsætismálaráðharri, og Laidoner, herovastin, sum hevði staðið á odda fyri frælsisstríðnum í 1918, sóu ikki sítt heimland aftur, men doyðu í Russlandi í fimtiárunum. Nú varð framd ein miðvís einsrætting av vinnulívi, mentan, átrúna og undirvísing. Tann størsta skelkin fingu estar tann 14. juni 1941, tá 10.000 av teirra landsmonnum uttan ávaring vórðu handtiknir, skræddir úr sínum heimum og førdir til Sibiria.

## Sovjetsk imperialisma

Í hesi sperdu støðu var tað mongum estlendingi ein lætti, tá ið Týskland tann 22. juni 1941 fór undir sína innrás í Sovjetsamveldið. Gleðin var stokkut, hóast tann týska hersetingin sum heild helst var eitt vet minni harðlig enn tann sovjetska, kanska av teirri grund, at nú var lítið eftir at oyðileggja.

Seinni varð lopið út í orð, av sovjetskum propagandistum, at estar skuldi hava verið fascistar. Hetta er sum heild reinur uppspuni. Estiski rithøvundurin Ain Kaalep vísir í eini grein um evnið (prentað í tíðarritinum *Ariel*, nr 4-5, 2001) hinvegin á, at 10% av teimum, sum vórðu burturflutt av russarum í 1941, vóru jødar. Líkasum ukrainarar og finnar vóru estar eitt skifti — av søguligum grundum — noyddir at samstarva við týskin, uttan fyri tað at vera fascistar.

Á sumri og heysti 1944, tá tann reyði herurin otaði seg vestureftir móti Týsklandi, byrjaði tann næsta sovjetska hersetingin í Estlandi, sum vardi til 1991. Avleiðingarnar vóru ógvisligar. 70.000 estar flýddu til Svøríkis, og 30.000 rýmdu til Týsklands. Fólk í túsundatali sjólótust í Eystrasalti. Útreinsingar vórðu framdar, ógvisligast í mars 1949, tá 22.000 estar vórðu handtiknir og førdir til Sibiria.

Í roynd og veru førdi Sovjetsamveldið hesi árini ein imperialistiskan politikk, sum m.a. hevði til endamáls at fremja etniska tynning í teimum baltisku tjóðunum. Undan krígnum vóru o.u. 95% av íbúgvunum í Estlandi estar. Eftir kríggið fóru russar undir at byggja verksmiðjur í Kohtla-Järve umráðinum í Norðurestlandi, sum m.a. framleiddu gass, fosfat, uranium og pappír. Árini 1945-53 fluttu 200.000 russarar inn í Estland, har mangir fingu arbeiði í hesum verksmiðjum. Eftir 1953 var prosentparturin av estum í landinum minkaður niður í 70.





*Hermann tornið í Tallin. Ovast veittrar tað estiska flaggið*

*Mynd: Hanus Kamban*



*Tann gamli býarmúrurin í Tallin*

*Mynd: Hanus Kamban*

## Hvør var Pent Nurmekund?

Leygardagin tann 27. apríl hevur sjónleikarbólkurin Varius framførslu í hølum hjá tí estiska rithøvundafelagnum. Høvundur og leikstjóri er Heidi Sarapuu. Vit sita í einum hvítum sali við bogaðum lofti og grønum gardinum. Leikurin teknar eina mynd av estiskum societylívi frá fyrra aldarskifti til í dag. Inn í leikin er flættaður upplestur av estiskum yrkingum eftir m.a. Mariu Under. Framførslan er neyv og sera professionell, dansurin fúkandi sprækin, rørslur og búnar geva eina heildarmynd, sum er eyðkend av yndi, lættleika og elegansu. Uppií er ikki sørt av sjálvspei, sum fær fólk at skera í látur.

Estiski rithøvundurin Anders Ehin — skald, týðari og blaðstjóri — rópar meg yvir til sítt borð. Meðan leikurin verður framførdur, greiðir hann mær frá høvuðsgongdini. Aftaná bjóði eg honum og Oddfríði yvir á mítt kamar á hotellinum. Við fáa okkum eitt prát uppi yvir einum whisky, og eg spyrji Ehin um Nurmekund. Ehin veit ein hóp um henda mann, sum hann hevur kent, og sum var vinmaður hjá móður hansara. Eg endurgevi hansara upplýsingar eftir minninum og við tí fyrivarni, at okkurt kann vera komið skeivt fyri.

Tað var greitt longu í barnaárunum, at Pent Nurmekund var, ikki bara málsligt flogvit, men eitt málfrøðiligt undurbarn. Hann hevði gávuna at læra eitt mál við fúkandi ferð. Umframt tað hevði hann eitt slag av fotografiskum klistriheila. Sum barn las hann skaldsøgur á enskum, og hann var førur fyri aftaná at endurgeva fleiri hundrað síður úr teimum orðarætt eftir minninum.

Nurmekund búði eitt skifti í estiska havnarbýnum Pärnu, har kom hann í samband við útlendskar sjómenn úr ymiskum londum, og soleiðis lærdi hann ein hóp av tungumálum. Seinni las han mál, og til endans dugdi hann fjøruti mál, teirra millum tey europeisku høvuðsmálini, umframt m.a. eisini urdu, svahili, sanskrit, kinesiskt og japanskt. Danskt lærdi hann av sjómonnum úr einum jútskum havnarbýi. Tá ið hann kom til lærda háskúlin í Keypmannahavn at lesa danskt, høvdu fólk ilt við at skilja hansara jútska mál. Men ivaleyst hevur hann so lært seg ríkisdanskt.

## Luxemburgskt

So so mangur annar mentaður esti kom Pent Nurmekund eisini at smakka sviðan av tí sovjetska águnginum. Eg haldi meg skilja, at hann sum persónur ikki var nøkur leyva, ein stillførur, innhugsin maður. Men ivaleyst var hann, sum málkønur og sostatt "kosmopolittur", hildin at vera serliga vandamkil. Hann varð handtikin, avhoyrdur og mátti greiða tornomum KGB-monnum frá sínum illgrunaverda málkunnleika. Hann fortaldi, at hann dugdi fjøruti mál, teirra millum eisini málið, sum talað varð í Luxemburg. Tá fleyt yvir hjá KGB-manninum.

"Sig mær Nurmekund", segði hann ilskur, "hví veikan hevur tú eisini lært teg luxemburgskt!"

Pent Nurmekund varð dømdur, handtikin og førdur til Sibiria. Nær hetta var, og hvussu leingi hann var í útlegd, er mær ikki greitt. Men kanska fer at bera til seinni at fáa neyvari upplýsingar um henda merkiliga mann. Anders Ehin sigur, at tað eydnaðist honum at koma aftur til Estlands á lívi. Heimafturkomin fekk hann starv við lærda háskúlan í tí gamla universitetsbýnum Tartu, har hann helt fyrilestrar um eysturlendsk mál.

## Skógarbrøður

Árini 1945-91 legðist lok yvir tey baltisku londini. Sum pax sovjetica seyraði inn í vesturlendska hugsan - sum ein skipan, einki gjørdist við - minkaði áhugin fyri Estlandi, Lettlandi og Litava. Frá sínum ungdómi mintust okkara foreldur teirra frælsistíð, men annars vóru tey gloymd.

Beint eftir kríggið vaks ein rørsla fram í Baltikum, sum fekk navnið *Skógarbrøður*. Tað var lætt hjá russarum at hava eftirlit við býum og opnum lendi, men í skógunum bar til at fyrireika uppreisn ella leggja seg í slys. Skógarbrøður førdu geriljakríggj, líkasum Viet Cong í Indokina. Áðrenn nakran vardi, kundu teir gera álop á vápnagoymslur, konvoyir ella einstaklingar.

Sum frá leið, bleiv teirra støða meira og meira hopleys. Eystrasalt var undir eftirliti, og sum timburídnaðurin vaks, og landbúnaðurin bleiv skipaður sum samogn, bar illa til at krógva seg í skógum ella hoyløðum. Rørslan syndraðist og krypladist, so at hon at enda tykist at hava havt brotsmannadám. Ein tann seinasti av skógarbrøðrunum, August Sabe, druknaði í september 1974, tá hann royndi at flýggja undan trygdarherliðum.

## Tjóðveldi av nýggjum

Tað nýggja estlendska frælsisstríðið fekk — sum teimum flestu kunnugt — ferð, eftir at Gorbatjov í 1985 varð kosin til aðalskrivara í Sovjetsamveldinum. Politiskar umstøður og taktisk neyðsyn høvdu við sær, at henda tilgongd ikki altíð var bersøgin og opin. Eitt nú hevði tað stóran týdning, at ætlanin var at byggja eina nýggja havn við Muuga eystan fyri Tallin og at lata upp eitt nýtt fosfatnám í Rakvere. Vistfrøðiliga vóru hesar ætlanir ikki skynsamar, og umframt tað høvdu tær kravt, at 10.000 russarar aftrat fluttu til Estlands. Sostatt reistist ein mótstøða, sum at síggja til snúði seg um umhvørvi, men í roynd og veru eisini var politisk.

Løgfrøðiligur nettleiki hevði eisini týdning. Sum fyrr nevnt hevði Sovjetsamveldið í 1920 viðurkent tað estiska ríkið. Tá ið russarar í 1940 tóku Estland, var innlimanin bygd á ta prógvgrund, at estar sjálvbodnir fóru upp í samveldið. Men tá ið tey loyniligu fylgiskjølini til Ribbentrop-Molotov sáttmálan vóru almannakunngjørd í 1989, kom ein onnur søga undan kavi: russarar høvdu sjálvbodnir kravt Estland. Sostatt varð staðfest, at tann estiska innlimanin í Sovjetsamveldið var ólóglig.

Tann 3. mars 1991 varð fólkaatkvøða hildin í Estlandi. 64% av estlendingum atkvøddu fyri loysing og 17% ímóti. Við tað at tann russiski minnilutin í Estlandi var 30%, merkti hetta, at eisini ein stórur partur av hesum minniluta tók undir við, at Estland loysti seg frá Sovjetsamveldinum. Tann 20. august 1991, dagin eftir

*Framhald á síðu 8*